Lagt til rættis: Inna Tørnroos
Myndir: Sosialurin

# SOLEIÐIS KOMA VIT Í JÓLAHÝR

**HJÁ SUMMUM** ER TAÐ STÝRT AT **KALENDARANUM**, HJÁ ØÐRUM ER TAÐ **KAVIN**, OG HJÁ NÓGVUM ER TAÐ **ANGIN** AV ONKRUM **JÓLALIGUM**, IÐ FÆR TEY AT KOMA Í **JÓLAHÝR**. **VIT** HEVUR SPURT **TRÍGGJAR** KENDAR **FØROYINGAR** UM, HVAT FÆR **TEY** AT KOMA Í **JÓLAHÝR**, OG HVØRJUM TEY HAVA **HUG** AT GEVA EINA **JÓLAGÁVU** Í ÁR

### Sigrún Brend, sjónvarpsvertur

Hvat fær teg at koma í jólahýr?
Eg eri eitt sindur kalendarastýrd, tá tað snýr seg um jólini. Fyrsta sunnudag í advent pynta vit til jóla, og jólatónleikurin verður tikin fram. Men treyðugt so, - nú ein dagin kavaði av møkum, og tá stóð nógv á, tí eg fekk slíkan hug at gera tað jólaligt heima.. So, tað er sindur ilt at siga, nær eg komi í jólahýri.

Hvør persónur hevur uppiborið eina jólagávu í ár?
Haldi, at jólaaftanstiltakið fyri einlig, sum KFUK skipar fyri á hvørjum ári, hevur uppborið ein stóra jólagávu. Tað eru Sonja Klein og maður hennara, Holger Arnbjerg, sum samskipa tiltakið. Summi ár hava verið upp í 30 fólk til jólahugnan.

– Hetta er so hjartanemandi tiltak, og tey ofra hetta familjukvøldið til frama fyri einlig. Sonja og Holger keypa jólagávur, persónligar jólagávur, til hvønn einstakan, sum hevur teknað seg til at koma. So tað eru nógvir handlar at fara í, áðrenn tey hava funnið jólagávurnar til gestirnar. Flott, flott og takk fyri tað Sonja, Holger og KFUK.

### Atli Gregersen, fólbóltsspælari

Hvat fær teg at koma í jólahyr?
– Eg komi í jólahýr, tá sonurin opnar sín sjokulátajólakalendara og kalendarin frá deyvafelagnum. Seinni sama dag fara vit altíð í føðingardag hjá babba, har síggja vit tvær fittar nissur hanga á vegginum, sum mamma altíð hevur hangandi á jólum.

Hvør persónur hevur uppiborið eina jólagávu í ár?
– Eg haldi avgjørt, at komandi konan hjá mær, Jenny, hevur uppiborið heimsins størstu jólagávu. At oyrini hjá henni halda til alt mítt prát er heilt ótrúligt!!

– Haldi eisini at øll, sum hava mist pengar í Eik, burdu fingið ein fittan jólapakka.

### Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum

Hvat fær teg at koma í jólahýr?
- At nýta tíð saman við dóttrini at tilevna og pynta heima og angin av granni og Ingrid Mariu súreplum er avgjørt nakað, ið vekir mínar sansir og fær sinnið ótilvitað at leita jólahýrin fram.

– Deiligi jólatónleikurin, bæði heimiligi og útlendski, skapa sjálvsagt eisini serliga stemningin.

– Eg havi eitt serligt barnaminni, og tað er eitt vakurt jólaorógv við myndum av og um Øskufíu, ið altíð varð hongt upp, tá jólini nærkaðust.

Hvør persónur hevur uppiborið eina jólagávu í ár?
- Eg haldi, fleiri hava uppiborið eina jólagávu. Tað eru mong, ið gera eitt stórt arbeiði at gleða og vera nakað fyri onnur, og tey vænta sær onki afturfyri. Hesi fólk hava stórt rós og tøkk uppibornað, og torført er at taka dagar ímillum.

– Um eg skal finna onkran ávísan at peika á, so meti eg avgjørt, at Absalon Matras eigur at fáa eina jólagávu. Hann og fleiri við honum hava í áravís verið í Rumenia við hjálp til teirra, ið treingja, og teirra arbeiði er avgjørt eina stóra jólagávu vert.

